## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av landsynningi, seinnapartin upp í andøvsgul. Regn ella mjørki av og á og hitin milum 13 og 16 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og sirm ella mjørki av og á. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Vit og grindin

**Í dag kemur nýggj bók út, sum lýsir føroyska grindadrápið úr einum søguligum og fólkalívsfrøðiligum sjónarhorni, eisini við atliti til føroyskum tjóðarsamleika**

BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nýggja bókin um føroyskt grindadráp er á enskum og hevur heitið »Pilot Whaling in the Faroe Islands. History. Ethnography. Symbols.

Bókin lýsir grindadrápið úr einum søguligum og etnologiskum sjónarhorni frá landnáminum til í dag. Hon byggir og bæði eldri og yngri heimildir.

Umframt søguligu og etnologisku lýsingarnar er eitt kapitul um, hvønn týdning grindadrápið hevur havt fyri føroyskan samleika og eitt kapitul um, hvørja fatan heimurin uttan fyri Føroyar hevur av grindadrápinum.

Tað er Jóan Pauli Joensen, professari og rektari á Fróðskaparsetrinum, ið hevur skrivaðbókina, sum hann hevur ognað minninum um faðir sín Petur Ola Joensen, sum andaðist í 1957.

Í bókini eru nógvar myndir bæði í svørtum og hvítum og í litum.

Bókin er nummar 51 í røðini Annales Societatis Scientiarum Færoensis, hon er 295 blaðsíður og er at fáa í bókabúðunum.kring landið

Tað er Forlagið Fróðskapur, Faroe University Press, sum gevur bókina út.




*Nýggja bókin um grindadráp viðgerð eisini spurningin um, hvørja fatan heimurin uttanfyri Føroyar hevur av føroyska grindadrápinum*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 15 |
| Lerwick | 18 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 26 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 24 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 22 |
| Helsinki | 25 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 28 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 25 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 998 hPa. vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani til Skotlands fer um Føroyar í dag.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer norðureftir og verður yvir Føroyum hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 30/06 kl. $06^{00}$ – 01/07 $06^{00}$. Hitin í gjár: 12,3°
Minsti hiti máldur í juni: -8,7° - Mesti hiti máldur í juni: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 30/06 kl. $06^{00}$ – 01/07 $06^{00}$.
Avfallið higartil í juni: 10 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

23. juni Mánin næstur jørðini
29. juni Fyrra tendring
4. juli Jørðin longst frá sólini
7. juli Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 1. juli | 02:51 | 15:14 | 01:51 | 14:14 | 02:06 | 14:29 | 04:51 | 17:14 | 05:51 | 18:14 | 01:06 | 13:29 | 00:06 | 12:29 | 03:06 | 15:29 | 04:06 | 16:29 | 02:36 | 14:59 | 03:51 | 16:14 |
| 2. juli | 03:37 | 16:00 | 02:37 | 15:00 | 02:52 | 15:15 | 05:37 | 18:00 | 06:37 | 19:00 | 01:52 | 14:15 | 00:52 | 13:15 | 03:52 | 16:15 | 04:52 | 17:15 | 03:22 | 15:45 | 04:37 | 17:00 |
| 3. juli | 04:24 | 16:49 | 03:24 | 15:49 | 03:39 | 16:04 | 06:24 | 18:49 | 07:24 | 19:49 | 02:39 | 15:04 | 01:39 | 14:04 | 04:39 | 17:04 | 05:39 | 18:04 | 04:09 | 16:34 | 05:24 | 17:49 |
| 4. juli | 05:14 | 17:39 | 04:14 | 16:39 | 04:29 | 16:54 | 07:14 | 19:39 | 08:14 | 20:39 | 03:29 | 15:54 | 02:29 | 14:54 | 05:29 | 17:54 | 06:29 | 18:54 | 04:59 | 17:24 | 06:14 | 18:39 |
| 5. juli | 06:04 | 18:27 | 05:04 | 17:27 | 05:19 | 17:42 | 08:04 | 20:27 | 09:04 | 21:27 | 04:19 | 16:42 | 03:19 | 15:42 | 06:19 | 18:42 | 07:19 | 19:42 | 05:49 | 18:12 | 07:04 | 19:27 |